# Tann mildi kanslarin

## Viðburðurin hjá Angelu Merkel kemur av, at hon er spøk, varin og lítið áleypandi. Hetta er samstundis hennara stóri veikleiki



*Angela Merkel – prestadóttirin, sum kom sær á odda í CDU og gjørdist Týsklands fyrsti kvinnuligi kanslari*

**Politisk kronikk**



**Hanus Kamban**

### Eitt endurreist ríki

Tann, sum í hesum døgum, nú Týskland fer á val, spákar í landsins býum, sær eitt fólk, hvørs einstøku borgarar tykjast nøgdir, fegnir um sítt lív og sítt arbeiði og ídnir eftir at greiða gerandisdagsins praktisku, ítøkiligu spurningar. Yvir andlitunum hvílir ró, samljóð og ikki sjáldan umhugsni, og summi strála av gleði og innankæti. Er skúlin nóg góður? Hvussu fái eg mítt barn inn á eina vøggustovu? Sleppi eg at varðveita mítt arbeiði?

Tað merkiliga og hugtakandi við hesum bílæti fata bara tey, sum síggja nútíðina úr fortíðar perspektivi. Tað nýggja Týskland varð til í 1871, savnað eftir trý preussisk kríggj, móti Danmark, Eysturríki og Fraklandi. Tann mikli savnarin var Bismarck, jarnkanslarin, vísasti og framskygdasti statsmaður, landið hevur havt.

Árini 1890 til 1945 eydnaðist tað amatørunum Wilhelmi II og Adolf Hitler at forkoma hansara verki. Í 1989 bleiv ríkið aftur savnað, og í dag heldur verkið hjá Bismarck fram, við tí muni, at á odda í dag stendur, ikki nakar strangur jarnmaður, men ein blíð, varislig og mjúkorðað kvinna.

Í morgin, leygardagin tann 27. september, fara ríkisins borgarar á val. Tá skulu avrikini hjá Merkel og hennara stjórn standa sína roynd.

### Lehman Brothers

Á Bismarcks døgum hevði Týskland ein stóran trupulleika, sum var geostrategiskur og kom av, at landið var girt inni millum tvey stórveldir. Í dag, takkað veri ES og múrsins falli, eru slík geostrategisk áhugamál ikki, fyribils í hvussu er, longur á skránni. Men nú í 21. øld hava nýggir trupulleikar - sum vit serstakliga kunnu hefta at tveimum døgum, tí 11. september 2001 og tí 15. september 2008 - víst síni grimu andlit.

Henda seinna hendingin, tá ið Lehman Brothers í USA fóru á heysin, avdúkaði ein kapital, sum var fúsur at eta sín egna kropp á svaðasvørði, og eina bankastætt, sum var fús, í sínum ódugnaskapi, grammleika og amorali, at taka sjálvt grundstøðið bæði undan sínum egnu stovnum og undan veldugum ríkjum.

### Prestadóttir

Tann politiska samansetingin er í Týsklandi í løtuni tann, at í landinum valdar ein stór samgonga, sum hetta verður rópt, millum teir báðar gomlu høvuðsflokkarnar, mótpólarnar CDU (samgonguna CDU-CSU) og SPD, tann týska javnaðarflokkin.

Á odda fyri hesi samgongu stendur Angela Merkel, prestadóttir, protestantur, fødd í 1954 í Hamburg, uppvaksin í býnum Templin í tí, sum tá æt DDR (Eysturtýskland). Hon er útbúgvin alisfrøðingur, dugir russiskt sera væl og hevur ein serligan tokka til teir russisku rithøvundarnar Tolstoj og Dostojevskij.

Angela Merkel tók við sum kanslari í november 2005, eftir javnaðarmannin Gerhard Schröder. Hon er, um vit brúka ein fortugdan samanburð, alt tað, sum Margaret Thatcher ikki var, rólig, blíð, fólkalig, sjáldan áleypandi, men trek at taka avgerðir. Hyggur ein at hennara flokki, so hevur CDU festi í Vestur- og Suðurtýsklandi, meðan CSU er gróðursett í tí katólska Bayern. At norðurtýskarin, protestanturin og kvinnan Angela Merkel hevur megnað at koma sær fram á oddan í hesum flokki er eitt bragd.

Hon hevur havt stóra ávirkan á tann afturhaldsflokkin, hon umboðar, brýnt og nútíðargjørt hann við m.a. at føra ein virknan familjupolitikk, har fleiri vøggustovur, stuðul til fólk við børnum og foreldrafarloyvi hava staðið á skránni. Av teimum 16 limunum í hennara stjórn vóru frá byrjan seks kvinnur.

### Hólmgongan

Angela Merkel hevur av hesi grund fingið vaksandi undirtøku frá týskum kvinnum, kanska serliga teimum norðanfyri. Men hennara viðburður kann eisini koma av, at hennara

Sosialurin